# Bjarni Djurholm: Vit mugu finna aðra loysn

**Nýggi Smyril skal helst hava fast atløgupláss í Havn, men tað verður rættiliga trupult at fáa Løgtingið at betala fyri útbyggingina, sum Tórshavnar Havn nú er í holt við**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Nýggja Suðuroyarskipið eigur at fáa fast atløgupláss í Havn, tí suðuroyingar skulu ikki sleppast í kollafirði, á Sundi, á Gomlu Rætt, ella aðrastaðni, sum hava verið nevnd, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum*

– Nýggi Smyril skal helst hava fast atløgupláss í Havnini og eg fari at gera alt, sum gerast kann fyri at fyri at fáa honum fast atløgupláss.

Enn veit Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, ikki, hvar nýggi Smyril sleppur at leggja at í Havnini, táið hann kemur til landið á heysti í 2004.

Ein frágreiðing frá Landsverkfrøðinginum hevur torpederað ætlanina, sum Tórshavnar Kommuna nú er í holt við á Bursatanga, har ætlanin var, at bæði Norrøna og nýggi Smyril skuldi hava atløgupláss.

Landið skal sjálvt byggja samferðsluhavn á Trongisvági og í Syðradali og Landsstýrismaðurin heldur, at landið eisini eigur at betala samferðsluhavnina, sum verður neyðug at gera í sambandi við nýggja Suðuroyarskipið.

– Eg haldi, at landið eigur at kenna sína vitjunartíð og at vera við til at loysa trupulleikan. Tað merkir sostatt eisini, at landið eigur at vera við til at betala samferðsluhavnina í Havn, eins og landið betalir til samferðsluhavn í Suðuroy.

Men, hvat úrslitið verður, veit hann ikki.

– Landið kann betala sín part á ymsan hátt, tað kann gerast við, at landið betalir ein part av sjálvari útbyggingini, tá ið hon verður gjørd, men tað kann eisini gerast við at landið bindur seg til at betala yvir eitt áramál, men tað kann eisini gerast við at havnagjaldið hækkar, so at landið betalir sín part á tann hátt.

– Og í síðsta enda er tað ein avgerð, sum løgtingið tekur.

### Kolldømd

Tórshavnar kommuna metti ikki, at stundir vóru til at bíða eftir svari úr Vinnumálaráðnum, so hon er av sínum eintingum farin at byggja út á Bursatanga við tí fyri eyga at gera samferðsluhavn til nýggju Norrønu og nýggja Smyril har.

Men Bjarni Djurholm viðgongur, at nú Landsverkfrøðingurin í rættiliga avgjørdum vendingum hevur kolldømt útbyggingina, verður tað rættiliga trupult at fáa løgtingið at samtykkja at betala til tað ætlanina.

– Landsverkfrøðingurin er okkara tekniski myndugleiki og tað ber ikki til, at eg fari at mæla løgtinginum til at betala til eina ætlan, sum hann hevur kolldømt, sigur Bjarni Djurholm.

– Tað er rættiliga nýliga, at vit fingu metingina hjá Landsverkfrøðinginum, so enn hava vit ikki havt stundir at viðgera hana.

Men hann sigur, at tað fyrsta, sum Vinnumálaráðið fer at gera eftir ársskiftið, er at taka málið upp.

Bjarni Djurholm heldur, at tá ið Smyril eigur at sigla á Havnina og tí heldur hann, at tað er burturvið at suðuroyingar verða settir av í Kollafirði, á Sundi, á Gomlu Rætt, ella aðrastaðni, har møguleikar hava verið nevndir.

– Men tað er eisini greitt, at nýggja Suðuroyarskipið fær ikki fast atløgupláss í Havn, uttan í samstarvi við Tórshavnar Kommunu.

Tí fer Vinnumálararáðið eisini beint eftir nýggjár at taka upp samband við Tórshavnar Komunu um málið.

– Tað er ongin ivi um, at tað áliggur mær at útvega nýggja suðuroyarskipinum hóskandi atløgupláss í Havnini, men tað krevur samstarv við Tórshavnar Kommunu og samband verður tikið upp við Kommununa beinanvegin í tí nýggja árinum.

Bjarni Djurholm sigur, at hann ivast ikki í, at tað fer at bera til at finna eina trygga loysn í samstarvi við Tórshavnar Kommunu.

Nú er rættiliga stórur munur á hvørjar metingar, Landsverkfrøðingurin hevur hevur av útbyggingini hjá Tórshavnar Havn og teirri meting, sum ráðgevararnir hjá kommununi sjálvari, hevur, tí ráðgevarin hjá kommununi heldur, at hetta er ein loysn, sum ber væl til?

– Ja, men Landsverkfrøðingurin er mín tekniski myndugleiki og hann haldi eg meg til. Eg havi eisini fult álit á teimum metingum, hann hevur gjørt av ætlanini.

Og so leingi, hann ikki góðkennir ætlanina, kann eg ikki mæla Løgtinginum til at betala til hana. Tí má ein onnur loysn finnast, heldur Bjarni Djurhholm.

Hann heldur, at tað er lítil meining í at byggja eitt skip sum nýggja suðuroyarskipið, skal tað ikki bera til at avgreiða bilar og ferðafólk á landið nóg smidliga, so at trupulleikar ikki stinga seg upp á landi, sum seinka ferðatíðini.

– Tí má skipið hava góð atløguviðurskifti í Havn, eins og tað fær í Suðuroy, har vit byggja eina góða samferðsluhavn, sigur Bjarni Djurholm.

# Klaga fyri løgmanni

**Tvøroyrar Kommuna hevur bíðað eftir svari frá løgmansskrivstovuni í í meiri enn eitt hálvt ár og nú hevur hon mist tolið**

ALMENN UMSITING
*Áki Bertholdsen*



*Tað er ein álvarsmál fyri allar kommunur í landinum at fáa greiði á, hvørji rættindi tey hava á sínum egna havnalagi, sigur Borgarstjórin á Tvøroyri. Her liggur Dúgvan við bryggju á Drelnesi í mai í fjør. Eftir hetta slapp hon ikki at leggja at longur*

Tvøroyrar Kommuna hevur nú klagað umsitingina í Landsstýrinum fyri sjálvum Løgmanni.

Orsøkin er, at kommunan nú í meiri enn eitt hálvt ár hevur bíðað eftir einum svari úr Landsstýrinum, men tað kemur ikki fram.

Og nú hevur kommunan mist tolið og hevur vent sær beinleiðis til løgmann og biðið hann um at syrgja fyri, at málið verður avgreitt beinanvegin.

Hetta er eitt mál, sum stavar frá í vár, tá ið Smyril var í dokk. Tá var ætlanin at Dúgvan skuldi sigla ímillum Havnina og Suðuroynna.

Men tað vildi Tvøroyar Býráð ikki góðtaka og tað samtykti tí at nokta Dúgvuni atløgupláss á Drelnesi.

### Sett til viks

Men hetta vildi Landsstýrið ikki góðtaka og Vinnumálaráðið heitti á Løgmansskrivstovuna um at seta avgerðina hjá býráðnum til viks. Vinnumálastýrið metti, at Býráðið kundi ikki hava heimild at nokta Dúgvuni atløgupláss, tí sostatt forðaði hon samstundis Strandferðsluni at røkja sínar skyldu, sum hon hevur eftir lógini.

Hesum tók Løgmansskrivstovan undir við. Kommunudeildin á Løgmansskrivsstovuni segði, at hon hevði gjørt eina fyribils løgfrøðiliga meting og eftir henni hevði Býráðið ikki heimild til at taka eina slíka avgerð. Tískil boðaði Kommunudeildin frá, at býráðssamtyktin um at nokta Dúgvuni atløgupláss, varð sett úr gildi.

Men samstundis boðaði kommunudeildin frá, at Løgmansskrivstovan skuldi taka eina endaliga avgerð í málinum, men til hon varð tikin, stóð hendan fyribils avgerðin við.

### Mist tolið

Hetta var 22 mai í fjør og síðani hevur Tvøroyrar Kommuna hvørki hoyrt orð ella eið aftur frá Løgmansskrivstovuni.

Nú hevur Kommunan so mist tolið og hevur klagað umsitingina fyri løgmanni. Í brævinum til løgmann, átalar kommunan, at Løgmansskrivsstovan ikki enn hevur viðgjørt málið liðugt. Kommunan sigur, at eftir hesum hevur Kommunan mist sínar heimildir og avgerðarrætt og at hetta er ein ógvuliga álvarslig støða hjá øllum kommunum í landinum.

– Landsstýrið hevur í umbúnað at leggja meiri ábyrgd út til kommunurnar, men viðgerðin av hesum máli leggur ikki upp til nakað líknandi, sigur Tvøroyrar Kommuna í brævi til løgmann.

Kommunan heitir tískil á løgmann um at bera so í bandi, at málið verður avgreitt sum skjótast.

Men hóast kommunudeildin hjá Løgmansskrivstovuni í mai í fjør segði, at Løgmansskrivstovan skuldi sjálvt taka eina endaliga avgerð, sendir Løgmansskrivstovan nú svartaper víðari yvir á Lógmálaráðið hjá Høgna Hoydal.

Í einum svari til Tvøroyrar Kommunu, sigur Løgmansskrivstovan, at hetta er eitt málsøki, sum Løgmálaráðið situr fyri og tí er málið sent Lógmálaráðnum til avgreiðslu.

Og her liggur málið so og Tvøroyrar Kommuna bíðar framvegis. Áður hevur Finnleif Guttesen sagt fyri Sosialinum, tað er ein ógvuliga grundleggjandi spurningur at fáa greiði á, hvørji rættindi ein kommuna hevur á sínum egna havnalagi.

Endar alt hetta við, at avgerðin hjá Landsstýrinum steendur við um, at kommunan ikki kann nokta Dúgvuni atløgupláss, umhugsar kommunan tískil at royna málið í rættinum.



# Nýggja samferðsluhavnin í Suðuroy verður nú bóðin út




*Soleiðis fer nýggja samferðsluhavnin í Suðuroy at síggja út. Hon skal hava tvær atløgusíður, eina innaru ferjulegu framvið landi og eina ytri ferjulegu framvið grótkastinum út a fjørðin*

**Bjarni Djurholm hevur borið Løgtinginum uppskot um at byggja nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði fyri í mesta lagi 60 milliónir**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Nú verður farið undir at gera samferðsluhavn í Suðuroy, sum tann nýggja suðuroyarferjan kann brúka.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, hevur borið løgtinginum uppskot um at byggja nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði fyri í mesta lagi 60 milliónir krónur og uppskotið verður lagt fyri løgtingið á einum av fyrstu fundunum í nýggja árinum.

Bjarni Djurholm sigur, at Tvøroyrar Kommuna hevur boðað frá, at hon ætlar at nýta havnina á Drelnesi til annað virksemi framyvir, og tí er møguleikin i kki kannaður, um tað ber til at ger ábøtur á havnina á Drelnesi, so at hon kann brúkast til nýggju suðuroyarferjuna eisini.

Og tískil er einasti møguleiki at byggja eina nýggja havn og hon verður nú gjørd nakað væl uttan fyri Drelnes.

Annars hava nógvir trupulleikar verið á Drelnesi við vindi og súgi, sum gera, at tað oftani ikki ber til at leggja at og binda skipini. Talan um tveir trupulleikar. Annar stendst av súgi á eysturætt, og hin stendst av vindi av útsynningi.

Men har ætlanin nú er at byggja nýggja havn, út ímóti Lítlu Holmum, ber væl til at gera eina góða og trygga havn.

Ætlanin er at bjóða havnagerðina út longu í januar ella í februar. Verklagið skal vera liðugt í september í 2004, men tó kann havnin helst takast í nýtslu longu á sumri sama ár.

### Tveir møguleikar

Ætlanin er at gera eitt 200 metra langt grótkast og eina ytri og eina innari ferjulegu við føstum betongrampum. Harumframt skal havnaøki gerast umframt landgongd til ferðafólk, farstøð á landi, eins og tað sjálvsagt skal bindast í landsvegin.

Tá ið ferjan liggur í innari leguni, hevur hon atløgusíðu til kaiøkið, og tá hon liggur í ytri leguni, liggur hon fram við grótkastinum.

Grótkastið hevur ein vinkul upp á 45° í mun til atløgusíðuna fram við kaiøkinum. Ferjan hevur síðuportur í stýriborð, so tá ið hon liggur í innaru leguni, kann hon nýta bæði hekkuportrið og síðuportrið til at avgreiða akfør, og tá ið hon liggur í ytru leguni, kann hon nýta hekkuportrið. Hinvegin kann hon bert nýta serligu landgongdina til ferðafólk, tá hon liggur í innaru ferjuleguni.

Mett verður, at sjálv havnin fer at kosta 55 milliónir. Harumframt verða útreiðslur til at byggja landgongd og fyribils farstøð mettar at vera 5 miliiónir krónur. Stór óvissa er tó á kostnaðarmetingini av landgongd og farstøð.

Skuldi tað eftir útbjóðingina víst seg, at kostnaðurin verður størri enn mett, ber til at bíða við at gera tað ytru ferjuleguna lidna.

Næsta ár hevur løgtingið samtykt at seta 18 milliónir av til endamálið. Upprunaliga hevði Vinnumálaráðið mett, at tað fór at vera neyðugt at seta 25 milliónir av næsta ár og at seta aðrar 30 milliónir av í 2004. At løgtingið hevur skarvað av, merkir helst, at neyðugt verður at játta pening til endamálið eisini í 2005.

Alt hetta merki so eisini, at tað er ivasamt um farstøð og landgongd verða liðug, tá ið suðuroyarskipið kemur á heysti í 2004.

### 3,5 milliónir í endurgjaldi

At landið sjálvt byggir samferðsluhavn í Suðuroy, merkir at Tvøroyrar Kommuna missir havnagjald. Eftir lógini eigur 1 kommunan tískil rætt til endurgjald fyri mista inntøku. Endurgjaldið verður goldið í einum, og verður roknað sum miðal árliga havnagjaldið seinastu trý árini faldað við fimm. Verður óbroytt framyvir, verður endurgjaldið til Tvøroyrar Kommunu sostatt einar 3,5 milliónir krónur.